# Samskip keypir flutningsfelag

**Flutningsfelagið Samskip hevur keypt hollendska flutningsfelagið Geest North Sea Lines**

SAMSKIP
*tíðindaskriv*

Við keypinum er Samskip vorðið størsta bingjuflutningsfelag í sigling "innan" Europa. Geest verður rikið, sum dótturfelag hjá Samskipum. Umsetningur Samskip's veksur úr á leið 1,5 mia. DKK til umleið 3,7 mia DKK. Talið av skrivstovum hækkar við 12 og eru nú 45 skrivstovur í 19 londum umsframt umboðsstovur.

Felagið bjóðar "short sea services" (t.e. sjóflutningur á stuttum leiðum í kapping við landflutning) í Baltikum, Norðsjónum, Írlandi, Bretlandi og Iberia. Geest er marknaðarleiðandi á bingjuflutningi í Vestur- og Suðureuropa, til Bretlands og Írlands. Mesti flutningurin er í 45 fót plattabreiðum bingjum. Virksemi hjá Geest fellir væl saman við flutninginum hjá Samskipum annars.



*Við nýggja keypinum meira enn tvífaldast umsetningurin hjá Samskipum*

Sambært Ásbjørn Gíslason, øðrum av forstjórum Samskip's, verður tað at taka nakað av tíð at samskipa feløgini. Ásbjørn Gíslason verður nevndarformaður í Geest.

Við keypinum er Samskip samstundis vorðin triðstørsta flutningsfyritøka av bingjuflutningi til og frá Rotterdam. Rotterdam er størsta flutningshavn í Europa.

Siglingarætlanin til og úr Føroyum kann sostatt tengjast at flutningsleiðunum hjá Geest í Rotterdam. Keypið av Geest er tí enn ein fjølgan av tænastunum til føroyskar inn- og útflytarar.

# Skeið um kommunur og nýskapan

NÁMSSKEIÐ
*Tíðindaskriv*

Mánadagin 7. mars og leygardagin 9. apríl skipar Granskingardepilin Fyri Økismenning fyri námsskeiði um "kommunur og nýskapan".

Umboð fyri allar kommunur í Føroyum eru boðin við, bæði politikarar og umsiting. Sama skeiðið verður hildið á Kambsdali og í Suðuroy. Nú mánadagin 7. mars verður tað í Auluni á Studentaskúlanum á Kambsdali og 9. apríl í Stóra Pakkhúsi í Vági.

Innihaldið á skeiðinum er fjølbroytt, men tað byggir tó á eina Norðurlendska verkætlan um "Kommunur og nýskapan", sum Granskingardepilin luttók í. Verkætlanin endaði í fjør. Tilfarið frá verkætlanini varð givið út í bók nevnd "Innovations and Institutions".

Martha Mýri og Olga Biskopstø stóðu fyri tí føroyska partinum av verkætlanini. Endamálið var at kanna, hvat samband er millum kommunala stovnin og nýskapan innan tað vinnulig, almenna og mentanarliga. Í verkætlanini luttóku Fuglafjarðar, Gøtu og Leirvíkar kommuna.

Sum nevnt var verkætlanin partur av eini størri norðurlendskari verkætlan, sum fevnir um londini Føroyar, Ísland, Noregi, Svøríki og Finnland. Tilfarið samanlagt gevur okkum eina heildarmeting av hvussu nýskapandi tiltøk verða framd í smáum útjaðaraøkjum, og um kommunalir stovnar hava nakran leiklut í hesum.

### Skráin fyri námsskeiðið:

• Martha Mýri, granskari, greiðir frá um verkætlanini "Kommunur og nýskapan".
• Olga Biskopstø, granskari, greiðir frá niðurstøðunum av dialogi millum leikfólk og granskarar á Røst í Noregi, har umboð fyri kommunur, virkir, stovnar og granskara vóru savnað.
• Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu, røður um evnið "Visjónir og nýskapan í Fuglafjarðar kommunu".
• Jón Tyril, formaður í felagnum Grót, lýsir avleidda virksemi av íløgum í mentan.
• Eirikur á Húsamørk, stjóri á Faroe Marine Products í Leirvík, røður um evnið "Vinnumenning og kommunalt samstarv í verki".
• Dennis Holm, granskari, viðger evnið: "Hvussu kunnu vit gera lokalar menningarætlanir?

# Telefon og fakta um Norðoyggjar

**Í næstum verður serstøk telefon- og kunningarbók borin í hvørt hús í Norðoyggjum**

ÚTGÁVA
*Jákup Mørk*

Í tíðindaskrivi verður sagt, at endamálið við bókini fyrst og fremst er at veita borgarunum í Klaksvíkar kommunu og Norðoyggjum eina betri tænastu. M.a. við at gera tað lættari at finna telefonfelagar, gera tað lættari at finna neyðuga kunning og hentar upplýsingar, og ikki minst at geva ein mynd av, hvat ein býur sum Klaksvík hevur at bjóða.

Bókin er 200 síður og inniheldur kunning um fyrisiting og deildir hjá kommununi, umframt kunning um kommunalar og almennar stovnar, kommunal umsitingarmál, tænastur og stovnar innan heilsu- og sosiala økið, skúlar og gransking umframt aðra kunning, ið hevur týdning fyri borgararnar í Klaksvíkar kommunu og Norðoyggjum.

### Bæði fyri FT og Kall

Umframt kunningarpartin er bókin eisini ein telefonbók. Telefonbókin fevnir bæði um fastnet- og fartelefonnummur hjá bæði Føroya Tele og Kall. Telefonbókin fevnir um allar Norðoyggjar.



*Borgarstjórin í Klaksvík tykist lata væl at nýggju bókini*

Eisini hevur hendan telefonbókin tann fyrimun í mun til vanligu telefonbókina, at Norðoyggjar ikki eru í einum, men at telefonfelagarnir eru skipaðir í bygdirnar, har teir búgva. Hetta ger tað munin í lættari hjá fólki at finna fram til rætta viðkomandi í skjótari vend.

Lýsingarnar í bókini eru flokkaðar undir slag av virksemi, hetta ger tað lætt at finna, t.d. klæðnahandlar, matstovur o.a.

Kunningarbóklingur um Norðoyggjar er givin út tvær ferðir áður, men hetta er so fyrsta ferðin, at talan samstundis er um eina telefonbók fyri økið.

Tað er Klaksvíkar kommuna, sum hevur latið bókina gera. Kunningar- og lýsingarstovan Cre8 hevur staðið fyri at savna upplýsingarnar, gjørt meginpartin av lýsingunum, umframt layout og umbróting.




**TOYOTA LANDCRUISER**
Árg 1998, Km 112200. Kr. 197000
Vøruvognur. El-rútar, anlegg v/fløguspælara, krókur, heilársdekk á lættmetalfelgum. Setur til aftan fylgja við. Vælhildin



**SSANGYONG MUSSO**
Árg 2005. Nýggjur Pick-up 4x4WD, centrallás, el-rútar, aircondition, plastinnsats í last. Prísur pers. bil 271.000 kr v/mvg - vørubilur 213.000 kr v/mvg .



**OPEL VECTRA**
Árg 2001, Km 32102. Kr. 145800
Fjarstýrt centrallás, multifunktiónsróður, tónaðir rútar, aircondition, elrútar framman, orig. opel radio. Píkadekk á felgum og summardekk á felgum fylgja við. Vælhildin



**MITSUBISHI GALANT**
Árg 1989, Km 158851. Kr. 15000.
Radio, nýumvældur m.a. útstoyt. Nýsýnaður. Vælhildin



**PEUGEOT 106 1.5D 3H**
Árg 2002, Km 78000. Kr. 78000.
Fjarstýrt centrallás, el-rútar, krók. Vælhildin.



**NISSAN ALMERA**
Árg 2002, Km 26000. Kr. 125000. 5 hurðar, aircondition, el-rútar framman, el-spegl, hita í setrum. Panasonic anlegg við fløguspælara. Vælhildin



**BMW 1,9 TDS 2 HURÐAR**
Árg 1999, Km 130000. Kr. 145000.
BMW 1,9 TDS, 2 hurðar, svart metallak, manuel gear, el-rútar, Sony anlegg v/fløgu, tracktioncontrol, 17'' lættmetalfelgur við nýggjum dekkum. Vælhildin



**KIA CLARUS**
Árg 1997, Km 125000. Kr. 79000. Elrútar framman, fjarstýrt centrallás, Pioneeer anlegg við fløgu, sportfelgur við góðum summardekkum, góð píkadekk fylgja við. Vælhildin



**OPEL VECTRA**
Árg 2001, Km 46045. Kr. 143500.
Takboylar, bagaguskjúlara, aircondition, teldudisplay, originalt Opel radio. Vælhildin.



**ROVER 400 2,0 BENSIN**
Árg. sept. 1998, koyrt 82.275 km, manuel gear, leðursetur, leðurróður, cruisecontrol, el-rútar, dupult airbag, stereoanlegg v/fløguspælara, tónaður rútar aftan. Góða píkadekk. Vælhildin.



**VOLVO V40**
Árg 2001, Km 46000. Kr. 195000.
Árgangur oktober 2001, motorstødd 2,0 146 hk, leðurkombi setur, síðuairbag í forsetrum, airbag í stólpum, gardinairbag, cruisecontrol, klimaanlegg, hita í forsetrum, fjarstýrt centrallás, alarm, startsperru, krók, tónaðir rútar aftan, antispin system/ESP, 3 punkts trygdarbelti í miðjuni aftan, xenon forlyktir, o.m.a. Informatiónscentur. Vælhildin.

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 51 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com